Frágreiðing
um innflutning úr Bretlandi

Apríl 2012
Sendistova Føroya í Bretlandi

Inngangur

Við jøvnum millumbili er høga príslegan í Føroyum til politiska umrøðu. Mangan verður havt á lofti, at Føroyar innflyta ov stóran part úr dýrastu londum í heiminum, eitt nú úr Danmark og Noregi. Í fleiri førum verður Bretland nevnt sum ein annar valmøguleiki, sum ikki verður nýttur í nóg stóran mun.

Søguliga hevur sambandið Føroya og Bretlands millum verið gott. Serliga undir seinna heimsbardaga, tá Føroyar vórðu vóru vardar av Bretlandi, og nærum øll bond vórðu slitin við Danmark í hesum tíðarskeiði. Tað hevði sostatt við sær, at so at siga allur samhandil Føroya var við Bretland hesi árini.

Eftir seinna heimsbardaga bleiv sambandið við Danmark uppafturtikið og minkaði samhandilin við Bretland nógv. Kortini finnast summar bretskar gerandisvørur enn á føroysku handilshillunum, til dømis Ty-phoo-te, Viscount, Wagon Wheels, Teacakes og Cadbury-sjokoláta.

Hóast samhandilin við Bretland minkaði nógv eftir seinna heimsbardaga, so er Bretland framvegis størsti útflutningsmarknaðurin hjá Føroyum. Her er serliga talan um fisk og fiskavørur, sum Føroyar útflyta. Men í seinastu uppgerðini hjá Hagstovu Føroya verður víst á, at samhandilin er minkaður við heili 30% í tíðarskeiðinum 2002-2011.

Í hesi frágreiðing um innflutning av bretskum vørum verður fyrst hugt eftir innflutningi sum heild og innflutningi av bretskum vørum. Síðani verður greitt frá møguligum orsøkum til lága innflutningin av bretskum vørum. Grundarlag fyri hesum parti eru samrøður, sum sendistovan hevur havt við føroyskar fyritøkur um royndir teirra við innflutningi úr Bretlandi umframt ta vitan, sum sendistovan hevur um handilsviðurskifti í Bretlandi. Síðani verður komið við nøkrum uppskotum til, hvussu hesi viðurskifti kunnu bøtast. Til seinast verða upplýsingar givnar um feløg og felagsskapir, sum møguliga kunnu hjálpa føroyskum fyritøkum at innflyta beinleiðis úr Bretlandi.

Innflutningur í tølum

Samlaði innflutningurin til Føroya í 2011 var 5,3 mia. kr., og av tí var innflutningurin av vørum, sum høvdu sín uppruna í Bretlandi, bert 135,2 mió. kr. Tað vil siga, at innflutningurin av bretskum vørum bert var á leið 2,6% av samlaða innflutninginum. Um vit samanbera hesi tøl við innflutning úr Danmark, so var innflutningurin av donskum vørum heili 26,4% av samlaða innflutninginum.

Innflutningurin av bretskum vørum hevur ligið um 3,2% til 5,3% av samlaða innflutninginum í tíðarskeiðinum 2002-2010, so innflutningurin í 2011 var tann lægsti í longri tíð.

Í uppgerð hjá Hagstovu Føroya[1] yvir samhandil Føroya við útlond sæst, at Føroyar hava størst samhandil við Danmark og Noreg. Men um hugt verður eftir innflutningi og útflutningi, so sæst, at her er talan um nógv størri innflutning enn útflutning. Størsti útflutningurin hjá Føroyum fer til Bretlands, men innflutningurin er sum sagt sera lágur.



Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningur av bretskum vørum

Um hugt verður nærri at innflutninginum av bretskum vørum sæst, at innflutningurin er minkaður í virði við meiri enn einari helvt síðani 2007, tá hann var størstur. Í 2007 innfluttu Føroyar bretskar vørur fyri góðar 294 mió. kr., sum svaraðu til umleið 5,3 % av samlaða innflutninginum uppá góðar 5,5 mia. kr.

Umframt hetta, so verða umleið helvtin av bretsku vørunum innfluttar umvegis Danmark. Í 2011 vórðu 53,2% av bretsku vørunum innfluttar umvegis Danmark. Árið fyri vórðu 49,8% av bretsku vørunum innfluttar umvegis Danmark. Í tølunum, sum Sendistova Føroya í London hevur fingið upplýst frá Hagstovu Føroya, sæst, at talið var lægst í 2005 tá 36,2% av bretsku vørunum, sum vórðu innfluttar umvegis Danmark, men longu tvey ár seinni var talið uppi á 62,1%, sum er tað hægsta í tíðarskeiðinum 2002-2011. Tølini vísa, at stórur partur av bretsku vørunum verða innfluttar umvegis Danmark.

Innflutningur av bretskum vørum

	2002	2003	2004	2005	2006	2007	2008	2009	2010	2011
Samlaður innflutningur har Bretland er upprunaland (mió.kr)	190,5	170,5	198,1	212,0	195,8	294,1	200,2	135,0	152,4	135,2
Bretskar vørur av samlaða innflutninginum	4,8%	3,5%	5,3%	4,7%	4,2%	5,3%	4,0%	3,2%	3,5%	2,6%
Bretskar vørur innfluttar umvegis Danmark	54,6%	50,8%	38,0%	62,1%	44,5%	36,2%	57,7%	59,2%	49,8%	53,2%

Kelda: Hagstovan Føroya 2012

[1] http://www.hagstova.fo/portal/page/portal/HAGSTOVAN/Hagstova_Foroya/news_repos/Handilsjavni%202011

Fríhandilssáttmálin við ES

Síðan 1991 hava Føroyar havt fríhandilssáttmála við ES. Tað merkir í grundregluni, at fríhandil er Føroya og ES millum. Fyri summar vørur er talan um fríhandil uttan avmarkingar, men fyri aðrar vørur eru ávísar avmarkingar galdandi. Hesar avmarkingar eru t.d. tollfríar innflutningskvotur og innflutningstollur. Her verður tó bert greitt frá tí partinum av sáttmálanum, ið fevnir um innflutning.

Ofta verður havt á orði, at Føroyar innflyta ov stóran part av samlaða innflutninginum úr Danmark, sum er eitt av dýrastu londunum í ES. Við støði í fríhandilssáttmálanum við ES, so er eingin munur á at innflyta vørur úr Danmark ella úr Bretlandi, tá hugsað verður um innflutningstoll og tollfríar innflutningskvotur fyri vørur, sum hava sín uppruna í ES. Her skal dentur verða lagdur á, at fríhandilssáttmálin umfatar bert vørur, sum hava Føroyar ella eitt land í ES sum upprunaland.

Fríhandilssáttmálin umfatar vørur, sum eru nevndar í kapitlum 1-97 í Tillagaðu Skipanini (*the Harmonized System*[2]*).* Vørur, sum fella undir kapitlarnar 25-97, sonevndar ídnaðarvørur og aðrar framleiddar vørur, sum t.d. miniralir, heilivágur, plast, timbur, pappír og tekstilvørur, kunnu innflytast tollfrítt til Føroya. Her er sostatt talan um fríhandil uttan avmarkingar. Vørur, sum fella inn undir kapitlarnar 1-24, sum t.d. plantur, frukt, grønmeti, kaffi og sukur, eru fevndar av frumskjølunum til sáttmálan. Í hesum frumskjølum stendur, hvørjar reglur er galdandi fyri ávísu vørubólkarnar. Tá talan er um innflutning til Føroya av vørum, sum hava sín uppruna í ES, so eru frumskjøl 1, 2 og 4 týðandi.

Frumskjal 1 fevnir um fisk og fiskavørur (íroknað rogn og rækjur), sum eru í kaptli 3 og ávísar vørur í kapitul 16 í Tillagaðu Skipanini. Frumskjalið sigur, at Føroyar skulu strika allan toll og allar tollkvotur fyri fisk og fiskavørur, sum hava sín uppruna í ES. Tað vil sostatt siga, at tað er tollfrítt at innflyta fisk og fiskavørur, sum hava sín uppruna í ES.

Frumskjal 2 fevnir um ávísar landbúnaðarvørur (m.a. matvørur og tilgjørdar matvørur), sum tollfrítt kunnu innflytast til Føroya. Undantiknar eru vørur, sum eru nevndar í frumskjali 4, grein 2, ein sokallaður negativ-listi. Talan er um vørur, sum stava frá seyði ella geitum umframt mjólk og mjólkarúrdráttir. Tað vil siga, at hesar vørur, eru ikki tollfríar at innflyta.

Frumskjal 4 fevnir um vørur, sum fella inn undir vørubólkarnar í kapitlum 1-24 í Tillagaðu Skipanini, og sum ikki eru nevndar í frumskjali 1. Hesar vørur kunnu innflytast tollfrítt til Føroya. Her er í høvuðsheitum talan um matvørur og tilfar til matvøruframleiðslu. Frumskjalið hevur ein sokallaðan negativ-lista yvir vørur, sum eru undantiknar, og tískil skulu tollast. Her er bert talan um vørur, sum stava frá seyði og geitum umframt mjólk og mjólkarúrdráttir.

[2] http://eur-lex.europa.eu/en/treaties/dat/12002E/htm/C_2002325EN.003301.html

Við øðrum orðum eru allar vørur við uppruna í Bretlandi og restini av ES tollfríar at innflyta, tó undantikið vørur úr seyði, geitum og mjólk.

Til seinast kann nevnast, at Isle of Man og Ermasundsoyggjarnar eru ikki partur av Bretlandi, og eru vørur haðani tískil ikki at rokna sum vørur við uppruna í ES.

Grein 25 í fríhandilssáttamálanum

Ofta verður tosað um, at norðurlendskar umboðsskipanir (agentur) kunnu vera ein orsøk til, at færri vørur verða innfluttar beinleiðis úr øðrum londum. Í grein 25 stk. 1 í fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og ES stendur at "*allir sáttmálar millum fyritøkur, viðtøkur hjá samtøkum og alt samskipað arbeiðslag millum fyritøkur, hvørs endamál ella úrslit er at forða, avmarka ella avlaga kappingina viðvíkjandi vøruframleiðslu ella vørusamhandli;"* eru *"ósambærlig við rætta mannagongd í sáttmálanum, um hesi ávirka samhandilin millum Føroyar og Felagsskapin".* Av summum verður hetta tulkað sum, at tað er, sambært sáttmálanum, ólógligt hjá umboðsskipanum at krevja, at vøran skal keypast ígjøgnum tey. Hetta er tó ikki løgfrøðiliga roynt enn í Felagsnevndini Føroyar-ES.

Møguligar orsøkir til lága innflutningin

Av tí at Føroyar søguliga hava havt gott samband við Bretlandi, so kann tað tykjast løgið, at innflutningurin av bretskum vørum til Føroya er so lágur. Ymsar orsøkir kunnu vera til tess. Sendistova Føroya í London hevur verið í samband við nakrar føroyskar fyritøkur, og blivu hesar fyritøkur millum annað spurdar um, hví tey ikki innfluttu meira úr Bretlandi.

Høgur kostnaður á flutningi

Felags fyri allar fyritøkurnar, sum sendistovan hevur verið í samband við, var, at tey nevndu høga kostnaðin á flutningi innanlands í Bretlandi sum eina høvuðsorsøk. Kostnaðurin at fáa vøruna frá framleiðaranum og til fráferðarhavnina hjá farmaleiðini til Føroya er sera høgur, og tað hevur við sær, at vøran í mongum førum gerst dýrari enn ein vøra, sum t.d. verður innflutt úr Danmark. Ein fyritøka nevndi, at tey høvdu verið úti fyri, at flutningskostnaðurin var líka høgur sum innkeypsprísurin á vøruni var.

Flutningsmøguleikar

Flutningsmøguleikarnir vóru eitt annað evni, sum allar fyritøkurnar nevndu. Ein fyritøka segði, at um javnur loftvegis flutningur hevði verið millum Bretland og Føroyar alt árið, so hevði tað helst borið til hjá teimum at innflutt beinleiðis úr Bretlandi. Sama fyritøka segði, at tað ofta var skjótari hjá teimum at bíleggja vøruna umvegis Danmark, tí flutningstíðin, tá bílagt varð beinleiðis úr Bretlandi, kundi

mangan vera upp í tríggjar vikur. Aðrar fyritøkur nevndu, at flutningsleiðirnar beinleiðis úr Bretlandi og til Føroya vóru úr býum, sum lógu langt burtur frá framleiðarunum. Hesir býir eru helst valdir eftir bestu útflutningsleið fyri føroyskan fisk, og tískil er helst ikki hugsað eins nógv um møguleikar fyri føroyskar fyritøkur at flyta vørur til Føroya á hesi somu farleið.

Eisini nevndi onkur fyritøka, at flutningskostnaðurin við núverandi farleiðum beinleiðis úr Bretlandi til Føroya var høgur samanborið til flutningskostnaðin úr Danmark til Føroya.

Fleiri farmaleiðir eru úr Bretlandi til Føroya:

- Faroeship siglir úr Immingham í Onglandi til Føroya (Tórshavn) umvegis Ísland, og tekur tað vørunum eina góða viku at koma til Føroya. Farmaskip teirra fer úr Immingham hósdag og er í Føroyum fríggjadagin í vikuni eftir.
- Samskip siglir eisini úr Immingham til Føroya (Kollafjørð). Samskip hevur tvær farleiðir millum Føroyar og Ongland. Tann “bláa” farleiðin úr frá Immingham umvegis fleiri onnur lond, og er skipið í Føroyum eina viku eftir fráferð úr Immingham. Tann “grøna” farleiðin er styttri, og tá er skipið í Føroyum fimm dagar eftir fráferð úr Immingham, tó bert aðruhvørja viku.
- Flutningsfyritøkan Fresh Link siglir úr Scrabster í Skotlandi á Toftir tvær ferðir um vikuna. Flutningsleiðin er ætlað til at útflyta fisk úr Føroyum til Bretlands, men eisini verður farmur tikin við úr Scrabster.
- Loftvegis ber til at flyta farm beinleiðis úr London til Føroya við Atlantsflog frá síðst í mei til hálvan september (2012).

Eisini skipa aðrar flutningsfyritøkur fyri flutningi til Føroya. Til dømis hevur Smyril Blue Water gjøgnum Blue Water Shipping skrivstovur í Onglandi og Skotlandi. Heilt sannlíkt er, at fleiri føroyskar flutningsfyritøkur taka sær av at skipa fyri flutningi av vørum frá framleiðara í Bretlandi til Føroya.

Prísur

Fleiri fyritøkur nevndu eisini, at innkeypsprísirnir í Bretlandi ikki vóru nóg góðir til at tað gav nakran fyrimun at innflyta vøruna hagani. Ein fyritøka nevndi, at fyri at prísurin skuldi vera kappingarførur, so skuldu fyritøkan keypa sera stórar mongdir. Av tí at føroyski marknaðurin er ein lítil marknaður, so ber ikki til hjá føroyskum fyritøkum at keypa ov stórar nøgdir. Ein fyritøka nevndi, at svingandi kursurin á bretska gjaldoyranum gjørdi, at prísurin á vørunum gjørdist ov óstøðugur frá viku til viku.

Ein onnur fyritøka segði, at prísurin á vørunum var á leið tann sami, sum á vørum innfluttum úr t.d. Danmark, men at góðskan á vøruni var verri. Her var serliga talan um frukt og grønmeti.

Ein av fyritøkunum, segði, at ein av høvuðsorsøkunum hjá teimum var, at tað í teirra føri bæði var lættari og bíligari at innflyta vøruna (her er talan um eina ávísa vøru, sum fyritøkan nýtir í sínari framleiðslu) ígjøgnum eina danska fyritøku. Tað tykist løgið, at tað kann vera skjótari og bíligari at innflyta bretskar vørur til Føroya umvegis Danmark heldur enn at innflyta tær beinleiðis. Ein møgulig orsøk kann vera, at ein danskur innflytari kann keypa størri nøgdir enn ein føroysk fyritøka, og kann tískil samráða seg fram til ein lægri prís.

Ein onnur fyritøka nevndi eisini, at tað var bíligari at bíleggja úr Danmark, men av tí at tey ynsktu at hava frískar vørur tvær ferðir um vikuna, so innfluttu tey úr Bretlandi eisini. Fyritøkan metti, at ein av høvuðsorsøkunum til, at matvørur vóru dýrari í Bretlandi var, at á bretska marknaðinum vóru nakrir sera stórir innkeyparar, sum so at siga stýrdu marknaðinum, og sostatt høvdu smærri handlar ongan veruliga møguleika at vera við. Í Danmark er tað øðrvísi við trimum áleið eins stórum innkeyparum, har tann eini keypir inn fyri smærri handlar og fyritøkur burturav.

Nógv lið

Tað at fáa samband við rætta veitaran ella samstarvspartin í Bretlandi kann eisini vera ein tíðar- og orkukrevjandi uppgáva. Mangan skulu fyritøkurnar gjøgnum fleiri lið, áðrenn komið verður fram til ein hóskandi veitara ella samstarvspart. Eisini hava persónlig sambond nógv at siga í gongdini at finna fram til veitarar og samstarvspartar. Einki samlað yvirlit er yvir fyritøkur í Bretlandi, og sera ymiskt er, hvussu fyritøkur eru skrásettar í ymsum londunum og landspørtunum. Eisini er ymiskt, hvat verður lagt í heitið á ymsu vinnugreinunum á enskum og føroyskum. T.d. hugtakið “heilsøla” er ikki altíð ein fyritøka, ið keypir stórt inn til víðari sølu í enska málinum. So arbeiðið við at finna ein bretskan samstarvspart er orku- og tíðarkrevjandi arbeiði, og eru helst nógvar fyritøkur, sum ikki hava møguleikar at seta tíð og orku av til hetta arbeiði.

Umboðsskipanir

Ein kostnaðarøking, sum ofta verður nevnd í samband við innflutning, er umboðsskipanir (agentur), sum krevja, at vøran verður innflutt umvegis umboðsfólkið. Fyritøkurnar, sum sendistovan hevur verið í samband við, siga seg ikki hava merkt nakað stórvegis til tað. Summir framleiðarar nevndu at byrja við, at eitt norðurlendskt umboðsfólk var fyri teirra vørur, og at vørurnar tískil skuldu keypast umvegis umboðsfólkið. Men tá so føroyska fyritøkan segði, at so vóru tey ikki longur áhugaði í at keypa vøruna, so hálsaði bretski framleiðarin um, og segði, at tað lat seg gera at keypa beinleiðis til Føroya – altso uttan um norðurlendska umboðið. Ein av fyritøkunum metti eisini, at skipanin við umboðum er ein farin tíð. Tó var eisini ein fyritøka, sum innflutti vørur beinleiðis úr Bretlandi, men fakturin uppá vørurnar bleiv gjørdur í Danmark hjá umboðnum.

Eingin fyritøka nevndi málsligar forðingar sum nakran trupulleika. Ein fyritøka segði, at málið var als ikki nøkur forðing, tí flestu føroyingar duga so mikið væl enskt, at tey klára at samskifta við bretar uttan stórvegis trupulleikar.

So samanumtikið tykjast orsøkirnar til, at innflutningurin úr Bretlandi ikki er størri, at vera, at prísurin á vøruni, tá hon er komin til Føroya, ikki er kappingarførur í mun til somu vøru, sum er innflutt úr Danmark ella aðra staðni, flutningsleiðirnar til Føroya ikki eru heilt nøktandi, og at tað er torført at fáa samband við rætta samstarvspartin í Bretlandi.

Hvat kann gerast fyri at økja um innflutningin?

Flest allar fyritøkurnar nevndu, at innanlands flutningskostnaðurin í Bretlandi var so høgur, at tað ofta hevði við sær, at prísurin á vøruni tískil ikki var serliga kappingarførur í mun til somu ella líknandi vørur úr øðrum londum. Hendan kostnað hava Føroyar onga ávirkan á, so tað er á øðrum økjum, at loysnir mugu finnast til tess at stimbra meiri innflutning úr Bretlandi.

Samstarvspartar

Ein loysn kundi verið, at føroyskar fyritøkur royna at finna samstarvspartar, sum liggja tætt at fráfaringarhavnunum, so flutningurin og harvið flutningskostnaðurin gerst lægri. Her kundi talan verið um t.d. heilsølur og onnur umboð, um kundu veitt vørur, sum føroysku fyritøkurnar eru áhugaðar í at innflyta.

Ein annar møguleiki er, at føroyskar fyritøkur finna sær samstarvspartar til t.d. innkeyp, so føroysku fyritøkurnar kunnu keypa inn saman við ella blíva partur av einum størri bretskum innkeypara ella heilsølu. Soleiðis kunnu føroyskar fyritøkur helst fáa betri prísir, av tí at innkeyparin kann keypa størri nøgdir.

Fleiri av fyritøkunum sóknaðust eftir heilsølum har tey kundu keypa meginpartin av teirra vørum. Fyritøkurnar hava torført at finna bretskar heilsølur, sum kunnu veita alt frá “eplum til blæur”, sum ein stjóri tók til.

Betri flutningsleiðir til Føroya

Flutningsleiðirnar hjá sjóvegis flutningsfeløgunum eru ætlaðar til útflutning av føroyskum fiski og fiskavørum, og tískil er flutningstíðin úr Bretlandi í fleiri førum sera long, og fráfaringarhavnirnar liggja ikki á skynsamasta stað. Serliga er hetta óheppið fyri feskar vørur so sum frukt og grønmeti, tí haldførið á tílíkum vørum er sera avmarkað. Tískil høvdu aðrar fráfaringarhavnir og styttri flutningsleiðir helst gjørt tað lættari hjá føroyskum fyritøkum at innflutt meiri beinleiðis úr Bretlandi.

Eitt ynski frá vinnulívinum er eisini, at beinleiðis flogferðsla úr Bretlandi til Føroya var alt árið. Ein av fyritøkunum nevndi Aberdeen sum ein møguleika umframt London.

Tørvur á bindiliði

Tað er sum áður nevnt ikki altíð so lætt at koma í samband við rætta viðkomandi í Bretlandi. Hetta kann vera ein orsøk til, at fyritøkur velja bretska marknaðin frá. Til tess at stimbra hugan hjá føroyskum fyritøkum at innflyta beinleiðis út Bretlandi, er eitt gott hugskot at hava eitt ráðgevandi føroyskt lið, sum virkar sum eitt bindilið millum føroysku fyritøkurnar og bretska marknaðin.

Vørur við uppruna uttan fyri ES

Til seinast verður vent aftur til høga kostnaðarstøðið í Føroyum. Til ber at innflyta vørur úr Bretlandi, sum ikki hava sín uppruna í ES. Bretland innflytur vørur úr øllum heiminum, og til ber eisini hjá føroyskum fyritøkum at innflyta hesar vørur til Føroya. Hesar vørur verða tó tollaðar, av tí at tær ikki hava eitt ES-land sum uppruna. Her skulu føroyskar fyritøkur vera varugar við ávís tollviðurskifti, ið kunnu vera ein orsøk til høga kostnaðin á vørum í Føroyum. Hetta eru viðskifti, sum eru galdandi fyri alt ES og tískil ikki bert í Bretland. Ábendingar eru um, at vørur, sum hava uppruna uttanfyri ES, gjalda toll í tveimum umførum. Um t.d. ein bretsk heilsøla keypir vørur heim til Bretlands úr Kina, so verða vørurnar tollaðar eftir galdandi tollreglum. Keypir ein føroysk fyritøka síðani kinversku vørurnar til Føroya, so verða vørurnar helst aftur tollaðar í Føroyum, tí á upprunaskjalinum til vørurnar stendur, at upprunalandið er Kina. Eingi haldføst prógv eru um hetta, men fleiri eru, sum siga seg hava varuga av, at hetta fer fram. Um hetta fer fram, so er hetta við til at gera vørur í Føroyum dýrari enn aðra staðni, og eitt áhugavert evni at kanna nærri.

Kontaktupplýsingar í Bretlandi:

UK Trade & Investment
Europa Building
450 Argyle Street
Glasgow
G2 8LH
United Kingdom
Tlf.: +44 20 7215 8000
www.ukti.gov.uk

Scottish Development International
5 Atlantic Quay
150 Broomielaw
Glasgow
G2 8LU
United Kingdom
Tlf.: +44 141 228 2828
http://www.sdi.co.uk/

Scotland Food & Drink
3, The Royal Highland Centre
Ingliston
Edinburgh
EH28 8NB
UK
Tlf: +44 131 335 0940
http://www.scotlandfoodanddrink.org/

The British Exporters Association
Broadway House
Tothill Street
London
SW1H 9NQ
United Kingdom
Tlf.: +44 20 7222 5419
t-postur: hughbailey@bexa.co.uk
www.bexa.co.uk

Federation of Wholesale Distributors
9 Gildredge Road
Eastbourne
East Sussex
BN21 4RB
United Kingdom
Tlf: +44 1323 724952
http://www.fwd.co.uk/index.asp

Hentar leinkjur:

Yvirlit yvir sokallaðar heilsølur ("wholesale") út Bretlandi: http://www.thewholesaler.co.uk/

Frágreiðing frá Hagstovu Føroya um handilsjavnan 2011:
http://www.hagstova.fo/portal/page/portal/HAGSTOVAN/Hagstova_Foroya/news_repos/Handilsjavni%202011

Sáttmáli millum Europeiska Felagsskapin øðrumegin og ríkisstjórn Danmarkar og Føroya Landsstýri hinumegin:
http://www.logir.fo/foldb/kunfo/1997/0000031.htm